Útbjóðing

# Oyggjaleiðir

SL fara við hesum alment at bjóða út arbeiði at bøta um Smyril, Dúgvuna og Rituna.

### Útbjóðingin fevnir um:

**Málaraarbeiði**
- Innanduramáling av veggum og loftum v.m.

**Gólvarbeiði**
- Umvæling av gólvum
- Veiting og álegging av teppum og vinyl

**Snikkaraarbeiði**
- Umvæling av borðum og veggum

**Møblaarbeiði**
- Vasking, reinsing og umvæling av sofum
- Veiting og uppseting av stólum
- Veita og hanga upp gardinur

**VVS-arbeiði**
- Skifting av vøskum v.m.

**Krøv**
- Hesi arbeiði verða øll boðin út undir einum.
- Útbjóðingin skal virka fyri, at ferðafólkini kenna eina hækking í tænastuni.
- Øll krøv og treytir verða ásett í útbjóðingartilfarinum.

**Tilboð**
Tilboð, merkt Útbjóðing Oyggjaleiðir skullu verða innkomin til:

**Strandfaraskip Landsins**
att. Tekniska Deild
Postrúm 88
FO-110 Tórshavn

í seinasta lagi 14. mars 2002, kl. 15:00.

SL skilar sær fullan rætt til at velja millum innkomin tilboð, ella ikki taka av nøkrum. Teir arbeiðstakarar, sum bjóða, kunnu verða hjástaddir, tá tilboðini verða latin upp. Sæð verður burtur frá tilboðum, sum ikki eru innkomin til tíðina.

Útbjóðingartilfar kann umbiðast hjá SL, tlf. 343000 ella t–post: sua@ssl.fo Áðrenn útbjóðingartilfar verður sent út, skulu kr. 500,- latast í depositum.

Nærri upplýsingar um útbjóðingina kunnu fáast við at venda sær til Súna Andreassen á Teknisku Deild.

STRANDFARASKIP LANDSINS

*Høvuðsuppgávan hjá fyritøkuni er at lúka landsins tørv á innanlanda fólka- og farmaflutningi, og skal fyritøkan í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði. Fólka- og farmaflutningurin setir stór krøv um eina góða kundatænastu, herundir trygd, reglusemi og skjótleika.*

*Árliga rakstrarætlanin hjá Strandfaraskipum Landsins javnvigar við yvir 150 mió. kr. Talið á starvsfólkum svarar til 180 fulltíðarstørv, herav umleið 155 operatørar. Talið á flutningsanleggum er 11 skip, 40 bussar og 15 lastbilar. Flutningsuppgávurnar fevna um alt landið.*




HITABLÁSARI
Sera væl egnaður til frambygdar bátar.
Verður kopiað inn í kølivatnið.
Fæst 12 ella 24 volt
D.J. ENNI
TVØROYRI
Tlf. 37 10 61


**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 2715, Sp/f Nakkur, 700 Klaksvík.

Viðtøkur broyttar: 23.02.2002.
Kapitalur:
Hækking við kr. 420.000,00 til kr. 501.000,00
Inngjaldingarháttur: Kr. 420.000,00 við skuldarumskifti til kurs 190.
Nevnd:
Farin úr nevndini: Høgni Lützen, Stoksoyravegur 7, 700 Klaksvík (formaður) og Jógvan Pauli í Kongsstovu, 785 Haraldssund.
Innkomin í nevndina: Símun Michael Zachariassen, Undir Klakki 16, 700 Klaksvík (formaður) og Jógvan Pauli Ziskasson, á Brekku 53, 700 Klaksvík.

Skráseting Føroya tann 28. februar 2002

Kristin Balle

# Avloysastarv á Ferðaráð Føroya

Ferðaráð Føroya sóknast eftir einum starvsfólki til marknaðardeildina í samband við farloyvi. Starvið er eitt fulltíðarstarv í eitt ár og verður at seta sum skjótast.

Arbeiðið fevnir um marknaðararbeiði, so sum messuluttøka, samskifti við ferðasmiðir, ferðaskrivstovur og fjølmiðlar, framleiðsla av faldarum og samskifti við føroysku ferðavinnuna. Marknaðirnir eru í høvuðsheitum Týskland, Eysturríki, Sveis og Frakland.

Arbeiðið verður lagt til rættis í samstarvi við leiðsluna.

Vit vænta, at umsøkjarin hevur hesar førleikar:
- Útbúgving og royndir innan ferðavinnu, marknaðararbeiði og møguliga innan verkætlanarleiðslu
- Holla vitan um Føroyar sum ferðamannaland og føroysk viðurskifti sum heild
- Kunnleika til og um aktørar í ferðavinnuni
- Hevur góðan telduførleika og málkunnleika
- Hevur góð samstarvsevnir og dugir at arbeiða sjálvstøðugt

Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Føroya Landsstýri og Starvsmannafelagið/viðkomandi yrkisfelag.

Skrivlig umsókn skal vera Ferðaráðnum í hendi, í seinasta lagi 18. mars 2002.

**Ferðaráð Føroya**
Postsmoga 118
110 Tórshavn

Ynskjast fleiri upplýsingar um starvið, kunnu áhugaði venda sær til stjóran, Heri Niclasen, á tlf.: 316055.

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 349, P/F Esmar Simonsen, 530 Fuglafjørður.

Nevnd:
Farin frá sum formaður: Tróndur Simonsen, 530 Fuglafjørður.
Innkomin í nevndina sum formaður: Regin Hammer, Ørnebjergvej 3k, 1tv., DK-2600 Glostrup.
Farin úr nevndini: Martin Simonsen, 530 Fuglafjørður og Jórun Klakstein, Skáltavegur 4, 700 Klaksvík.
Innkomin í nevndina: Mourits Simonsen, Kambsdalur, 530 Fuglafjørður.

Skráseting Føroya tann 28. februar 2002

Kristin Balle

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3302, Sp/f Pennzoil Føroyar, 100 Tórshavn.

Viðtøkur broyttar: 11.02.2002.
Nýtt navn: Sp/f Føroya Oljusøla

Skráseting Føroya tann 28. februar 2002

Kristin Balle


Atlas Copco
KANGO

El-brekkarir
El-borimaskinur
El-kombimaskinur
bora & brekka
Borar & meitlar
Kaj Andreasen & Co
Heilsøla, smásøla og umboð - Tel. 315600 - Fax 318008

Gravsteinar, kantsteinar og blómubeð
Nú eisini úr Føroyskum gróti
Skjót levering
Prísir við lítmyndum verða sendir kring landið og til útlandið
Danstein
www.danstein.fo
Tel. 447512
Tel. 217512
Tel. 318323
Fax 449961
RUNAVÍK - R. C. EFFERSØESGØTA 19, TÓRSHAVN
Sosialurin - 311820




TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Frítíðaravloysarar

Tórshavnar Ellis- og Umlættingarheim søkir eftir sjúkrasystur, heilsuatstøðarum og hjálparfólkum at avloysa í summar.

**Størvini**
Sjúkrasystraarbeiðið umfatar sjúkrarøktararbeiðið á heiminum. Heilsuatstøðaraarbeiðið og hjálparfólkararbeiði umfata alt vanligt arbeiði á heiminum, t.d. eldrarøkt og reingerð.

**Setanarviðurskifti**
Arbeiðið er skipað í vaktum. Løn sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag

**Meiri fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Sólgerð Djurhuus, fyristøðukvinnu, tlf. 311839, ella Hanne-mi á Brúgv, deildarskjúkrasystur, tlf. 315522.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skulu verða Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 06. mai 2002. Viðmerk á umsóknina "Frítíðaravloysari"

SNARSKIVAN

**Almanna- og Heilsumálastýrið**
*Starvsfólkadeildin*

# Skrivari til Almanna– og heilsumálastýrið.

**Eitt starv sum skrivari hjá deildarstjóra í Almanna- og heilsumálastýrinum, Almannadeildini, er leyst til setan skjótast tilber.**

**Arbeiðið umfatar í høvuðsheitum at vera skrivari hjá deildarstjóranum, men harumframt eisini hjá starvsfólkunum á Almannadeildini, somuleiðis kann roknast við øðrum uppgávum sum t.d.:**

- Vanligt skrivstovuarbeiði/málsfyrireiking
- At skipa fyri fundum.
- Vera skrivari hjá nevndum/arbeiðsbólkum.

**Vit hugsa okkum at tú hevur:**
- Skrivstovuútbúgving og hollar royndir
- Kunnleika til almenna fyrisiting
- Kunnleika til mál
- Hollan kunnleika til skrivligt føroyskt
- Kunnleika til EDV á høgum brúkarastøði
- Góð samstarvs- og samskipanarevni
- Duga at arbeiða sjálvstøðugt

**Vit bjóða:**
Eitt fjølbroytt og spennandi starv, sum tú sjálv/ur verður við til at skapa, til tíðir strævið, men samstundis sera áhugavert og mennandi við góðum skeið- og eftirútbúgvingarmøguleikum.

**Lønar– og setanartreytir:**
Starvið verður sett sambært sáttmála ímillum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið og er flokkað í lønarflokki III.

Setanarøkið umfatar Almanna- og heilsumálastýrið og stovnar undir tí.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Aibritt á Plógv, aðalstjóra tlf. 304050.

**Umsókn:**
Umsókn við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skal sendast til:

**Almanna- og heilsumálastýrið**
Eirargarður 2
100 Tórshavn.

**Umsóknarfreist:** 18. mars 2002 kl. 12.00.

Sosialurin

# Fiskivinnubladið 2002

Í Sosialinum 13. mars verður stórt innlegg um fiskivinnuna. Tað fer at snúgva seg um okkara fiski-, ali- og sjóvinnu, bæði á sjógvi og landi.

Umframt vanligu útbreiðsluna verður Sosialurin hendan dagin eisini sendur øllum reiðaríum og skipsmanningum umframt at blaðið verður ókeypis at fáa á Fiskivinnuráðstevnuni "Kappingarføri og lønsemi hjá fiskivinnuni" sum Farec skipar fyri á Hotel Föroyum 15. mars. So útbreiðslan 13. mars verður nógv størri enn vanligt.

Tí heita vit á tykkum, sum selja/umboða skipsútgerð og útgerð til sjóvinnuna annars, um at lýsa í hesum blaðnum, so hendan útgávan gerst uppaftur meira áhugaverd.

Freistin fyri at fáa eina lýsing við er mánadagin 4. mars.

Hetta er eitt gott høvi at kunna viðskiftafólk tykkara um tað, tit selja/umboða og tær tænastur, tit veita innan høvuðsvinnuna.

Tær fyritøkur, sum ynskja at verða við, eru vælkomar at venda sær til okkum og fáa nærri upplýsingar.

Ringið til Sosialin 311820 og tosi við

Finnbjørg Nattestad
Marknaðardeildin
*finnbjorg@sosialurin.fo*





www.sosialurin.fo

www.sosialurin.fo